# veiðiloyvum



endurskoða alla lógina um vinnuligan fiskiskap.

– Eg havi skilt, at ein partur av hesum arbeiði eisini fer at fevna um eitt møguligt tilfeingisavgjald, sum nú afturvendandi verður tosað so nógv um.

Formaðurin í reiðarafelagnum vísir á, at tá ið lógin um vinnuligan fiskiskap varð gjørd í 1993 og sett í verk í 1994, var hetta í tøttum samstarvi millum umsiting og vinnu.

– Nú landsstýrismaðurin hevur sett ein arbeiðsbólk at endurskoða lógina, er øll vinnan hildin uttanfyri, og tað eru vit sera vónsviknir av.

Jákup Sólstein sigur, at vinnufeløgini hava mótmælt, at tey verða hildin uttanfyri í hesum arbeiði, sum tey vóru við til at leggja lunnar undir fyri meira enn 10 árum síðan.

– Men okkara mótmæli hava so higartil ikki givið nakað úrslit, sigur formaðurin í Føroya Reiðarafelag at enda.



*- Í mínari verð er tað eingin trupulleiki, at teir, sum hava eina óvanliga inntøku við skipasølu, verða skattaðir. Men eg haldi, at tað er forkastiligt at kroysta pening úr vinnuni, meðan hon er í gongd, sigur Jákup Sólstein*

*Mynd: Jens Kr. Vang*




*Norðskálatunnilin hevur leingi verið ein deyðsfella, og støðan gerst uppaftur verri, tá ið fólk ikki duga at koyra, soleiðis sum gøtumaðurin í hesi greinini greiðir frá*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Skilaleys koyring í Norðskálatunlinum

**– Sunnudagin koyrdi eg aftanfyri ein bil í Norðskálatunlinum, sum fyri tað mesta koyrdi í skeivari síðu á vegnum. Tað var um reppið, at hetta førdi til eina álvarsliga ferðsluvanlukku, sigur ein bilførari í Eysturoy við Sosialin**

FERÐSLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

– Eg helt, eg mátti senda tær hesar reglurnar, nú eg las um óhappið í Leirvíkartunlinum, har ein ung kvinna leygarmorgunin kom illa fyri, tá ið hon møtti mótkoyrandi bili, sum koyrdi í skeivari síðu í tunlinum.

Soleiðis skrivar ein lesari í brævi til Sosialin.

Vit vita, hvør lesarin er og hava hansara fulla navn og adressu. Halda tó ikki, at tað er so avgerandi fyri hesa álvarsomu søgu, hvør persónurin er.

### Skilaleys koyring

– Sunnumorgunin koyrdi eg úr Gøtu til Havnar. Eg var í Norðskálatunlinum um 11-tíðina fyrrapartin. Inni í hálvum tunlinum kom eg at koyra aftanfyri ein lítlan stationbil, sum fyri tað mesta koyrdi í skeivari síðu á vegnum. Tvær ferðir møtti hesin mótkoyrandi bilum – og fyrru ferðina kom hann til tíðina á røttu breytina.

Lesarin sigur, at verri gekst aðru ferð; tá var um reppið, at tað endaði galið!

– Bilførarin, sum kom ímóti bilinum, ið koyrdi í skeivari síðu, varnaðist vandan – og steðgaði. At síggja til, bíðaði hesin bara, til hann bleiv ákoyrdur. Men lukkutíð. Beint, áðrenn tað stoytti, snaraði førarin, sum koyrdi frammanfyri meg, á rætta breyt, og soleiðis "spældi" alt væl av – hesaferð.

Lesarin leggur aftrat, at ferðin hjá bilføraranum, sum koyrdi í skeivari síðu, var ikki stór.

### Eldri menn

– Eg slapp mær sum skjótast framvið bilinum, tá ið vit komu út úr tunlinum. Í bilinum vóru tveir eldri menn.

Lesarin sigur, at tíverri gáaði hann ikki eftir nummarspjøldrunum á bilinum.

– Men eg síggi í dag – og serliga nú eg las um hendingina við ungu kvinnuni í Leirvíkartunlinum, at rætt hevði verið at noterað nummarspjaldrið og meldað fyri skilaleysa koyring. Tað er jú ikki heilt óhugsandi, at talan kann vera um sama bil í báðum førum, sigur lesarin.



*Eisini í Leirvíkartunlinum koyrdi ein bilur í skeivari síðu á vegnum leygarmorgunin*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*